

## Wrexham vann

Gunnar Nielsen vardi málið, tá Wrexham vann 2-0 á Mansfield Town í fjórðbestu ensku fótbóltsdeildini leygardagin. Gunnar Nielsen er leigaður til Wrexham úr Manchester City, har hann hevur sáttmála. Hetta var annar dysturin hjá Gunnari Nielsen í málinum. Wrexham er við sigrinum 10 stig frá play-off plássunum um uppflyting, nú seks dystir eru eftir at spæla.

## Lukasz skoraði

Póllendingurin Lukasz Cieslewicz, sum í fleiri ár spældi í VB, var annar av málskjúttunum, tá ið Hvidovre fekk javnleik í næstbestu donsku fótbóltsdeildini um vikuskiftið. Lukasz legði Hvidovre á odda eftir fýra minuttir, men síðani skoraði Fredericia tvey mál. Í seinasta minutti av dystinum eydnaðist tað Hvidovre at javna og tryggja sær eitt stig burtur úr heimadystinum.

HB-B68 3-1 (2-1):

# Rusturin má bankast burtur

HB

B68

**HB vann tey trý stigini, sum vóru kravið undan leygardegnum, men spælið í ársins fyrsta landskappingardysti gevur rúm fyri stórum batum hjá FM-biðlunum**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Sum annar av heilt stóru FM-favorittunum vistu tey í HB-húsinum, hvat kravið var undan fyrsta heimadystinum í Vodafone-deildini.

Trý stig skuldu fáast til høldar móti B68, og tá dómarin hevði bríkslað fyri seinastu ferð, var hetta eisini úrslitið. Men ávegis vórðu heimaáskoðararnir hildnir á pínubeinkinum, og toftamenn høvdu sum so eisini góða orsøk at iðra seg um úrslitið av dystinum.



*Hóast navnabrævið er farið um tey 38, so vísti ein stórspælandi Øssur Hansen, at hann væl og virðiliga hevur bæði evni og vilja at spæla við millum tey fremstu í føroyskum fótbólti*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Deyðbóltar kostaðu

Gestirnir vóru nevnliga leikliga omaná stóran part av dystinum. Frá byrjan var greitt, at B68 sum so ikki kendi tað sum sína skyldu at koma til Havnar at undirhalda áskoðarunum við bergtakandi álopsfótbólti. Og hóast HB fekk nógv pláss at spæla á á miðvøllinum, so mgnaði heimaliðið sum so heldur ikki at skapa sær tað heilt stóra.

Toftamenn dugdu hinvegin væl at seta ferðina upp, tá kontra vórðu sett ígongd, og tað tók teimum ikki nógvar minuttir, áðrenn eitt av hesum gav úrslit. Øssur Hansen, sum við sínum 38 árum brilleraði á vinstra bakki, kom sær niðan við í álop, og tá millimetur-neyva innleggið fekk bæði Rana D. Christiansen og Símun Rógva Hansen at ivast, stútaði Dánjal Pauli Højgaard púra róliga bóltin í netið til 1-0.

Spælgongdin hóvaði avgjørt ikki HB-venjaranum, og longu eftir 28 minuttum framdi hann fyrstu útskiftingina, tá ein sjónliga vónbrotin Bjarni Jørgensen varð tikin út.

Uttan iva ein avgerð, sum nógv hveptu seg við, men tað tók ikki innskifta Milan Kuljic langa tíð at gera vart við seg. Toftamenn løgdu ikki so í markeringarnar, tá Rasmus Nolsøe sendi fríspark innfyri, og so kundi Kuljic stýra bóltinum í netið til javnleik.

Og talan var aftur um deyðbóltsstu, tá HB legði seg á odda. Toftamenn vildu fegnir havt fríspark í støðuni, men tað endaði alt við, at bólturin eftir hornaspark støkk út móti Rógva Poulsen, sum við einum dreymahøggi sendi bóltin í meskarnar.

### Brotssparkið

Seinni hálvleikur gjørdist í fleiri mátar enn meir tamur enn hin fyrri. HB hevði nú ikk fyri neyðini at trýsta tað minsta, og fram til seinastu 20 minuttirnar ella so hendi lítið og einki.

Tað noyddi gestirnar at satsa, og ein góða løtu hóttu teir veruliga við at eta seg aftur í dystin. Største møguleikan av øllum fingu teir, tá Øssur Hansen byrjaði álop niðri við egnan brotsteig, og har alt endaði við, at bæði Øssur sjálvur og Dánjal Pauli Højgaard gjørdust mest sum púra leysur. Alt endaði tó við, at bólturin støkk á stólpan, eftir at málverjin í fyrstu atløgu hálvbjargaði, og lítla løtu seinni var HB veruliga á sigurskós.

Upprunaligi stútarin frá Hans á Lag átti kanska betri lagnu, tá fyrsta veruliga gjøgnumspælda HB-álopið endaði við drønstútar á tvørtræið. Men tað líktist einum sera tunnum brotssparki, tá Poul Jóhannus Justinussen og Hans á Lag kappaðust um at røkka returinum. Tað í sjálvum sær fekk øði í gestirnar, og teir blíðkaðust einki serligt, tá Eiler Rasmussen dømdi nýtt brotsspark, eftir at Petur Meinhard Magnussen traðkaði dekan ov langt út úr málinum, áðrenn hann bjargaði royndini hjá Andrew av Fløtum.

Og so kundi talan vælr verið um ordiligan stórsigur eftir hetta. Gestirnir mistu fullkomuliga luftina, og í einum trimum førum spældi HB seg fram til rimmar møguleikar, sum tó ikki vórðu gagnýttir.

Tað gav at enda væntaðu myndina, har HB fekk sær ein á pappírinum tryggan sigur. Men tað er eingin ivi um, at spælið skal lyftast heilt nógv komandi dystirnar, um siðvanda felagið aftur í ár vil spæla við í gulldystinum.

## Royndu at spæla okkara spæl

Hóast B68 ta einu løtuna loypti hvøkk á, so helt Kári Nielsen hjá HB ikki, at hetta av álvara skapti ótta á liðnum hjá HB.

- Eg haldi ikki, at vit vóru bangnir. Men vit høvdu eitt sindur trupult við at fáa glið á okkara spæl, og tá teir so skora, so verður tað sjálvandi enn truplari, so vit fingu nokk ein lítlan hvøkk av hesum.

- Men tekin vóru tó ongan tíð um panikk. Vit avráddu eisini í steðginum, at vit skuldu halda á fram at royna at fáa okkara spæl fram, og tað gekk so eisini í seinasta enda.

*Og tey trý stigini vóru kanska meira umráðandi enn sjálvt spælið?*

- Sjálvandi. Hetta er fyrsta umfar, so tað ráddi um hjá okkum at fáa eina góða byrjan, og hana fingu vit, segði Kári Nielsen eftir dystin.

**-mørk**

## Súr kensla

Hjá toftamonnum var lagið avgjørt ikki av tí besta, tá teir fóru úr høvuðsstaðnum leygardagin.

Eftir dystin tosaðu vit við Jóhan Dáva Højgaard, og hann helt púra avgjørdur, at B68 átti betur uppiborið á degnum.

- Fram til triðja málið skapa teir ikki ein tann einasta møguleika í opnum spæli, so sjálvandi er tað súrt hjá okkum, tá vit mugu heim uttan stig, segði Jóhan Dávur, sum serliga hevði hug at ilskast um brotssparkið, sum av álvara punkteraði dystin.

- Hatta var katastrofalt fyri okkum. Ein stórur maður sum Hans á Lag eigur heldur ikki at detta, bara tí menn skumpast inni í brotsteiginum. Og tá okkara málverji so bjargar, verður brotssparkið dømt at takast umaftur. Tað eru tað so nakrir dómarar, sum gera, meðan aðrir ikki gera tað.

- Men eg haldi avgjørt, at vit spældu ein hampuliga góðan dyst, og tað kennist frustrerandi, at vit nú mugu heim uttan nakað sum helst, segði Jóhan Dávur Højgaard.

**-mørk**